

# Langt er millum heilt stóru sigrarnar

**STÓRSIGRAR** Tá ið EB/Streymur sunnudagin vann 8-0 á B71, var talan um størsta sigur í bestu deildini í fimm ár

Rólant Waag Dam

Nógv mál vórðu skorað í hesum umfarinum í landskappingini. Fyrstu dystirnir vóru sunnudagin, og tá ið umfarið var liðugt í gjárkvøldið, var samlaða máltalið 25 ella 5,0 í miðal fyri hvønn av teimum fimm dystunum.

Størsta málrokið var í Streymnesi, har væl upplagda heimaliðið vann 8-0 á illa sperda B71. Tað var ikki óvæntað, at EB/Streymur vann á sandoyingum, men tað var óvæntað, at talan skuldi gerast um sovorðið skrædl, tí B71 hevði jú megnað 2-1 í Gundadali ólavsøkudag ímóti HB.

Hetta var bara triðja ferðin í ár, at talan var um úrslit, har málmunurin var fimm mál ella meiri enn tað. Fyrsta ferðin var í fyrsta umfari, tá ið B68 vann 5-0 á heimavølli ímóti B71. Hetta var 1. apríl, og 27. juni var tað púra óvæntað, at B36 skuldi vinna 5-0 í Fuglafirði. Hetta var aftaná, at ÍF hevði vunnið 4-2 á heimavølli ímóti B68 og 2-0 á Sandi. Tað vísir seg ofta, at sovorðin skelkandi stórtap lúra, tá ið tað annars frammanundan hevur hilnast væl.

8-0 EB/Streyma sigurin á B71 er tann største í bestu fótbóltsdeildini í fimm ár. Í 2005 vann HB tveir stórsigrar á ÍF í Gundadali – 6-0 11. mai og so 9-0 10. juli. Síðani tá og inntil síðsta sunnudag var einki úrslit, har munurin var meiri enn sjey mál.

Frá fyrsta umfari í 2005 og inntil í dag hevur málmunurin í 24 av 531 dystum verið størri enn fýra mál. HB og EB/Streymur hava vunnið seks ferðir í part við so stórum málmuni, KÍ hevur vunnið tríggjar so stórar sigrar hesi árini, B36 og B68 hava vunnið tveir stórsigrar, og Víkingur, GÍ, NSÍ, Skála og ÍF hava vunnið ein stórsigur í part síðani 2005.

Nú er langt síðani, at talan hevur verið um sigrar við tvey sifraðum tølum. Tað er ikki komið fyri, síðani B36 á heimavølli í 2001 vann 15-0 ímóti FSV. Vágaliðið flutti niður, og B36 vann FM.

*rolant@sosialurin.fo*

## Sigrar – 5 mál ella fleiri 2005-2010

**2010**
1. apríl **B68-B71 5-0**
27. juni **ÍF-B36 0-5**
1. august **EB/Streymur-B71 8-0**

**2009**
2. august **EB/Streymur-KÍ 7-0**
12. september **ÍF-KÍ 5-0**

**2008**
30. mars HB-Skála 8-1
28. mai B71-Víkingur 0-5
6. juli HB-B68 5-0
27. august HB-Skála 6-1
31. august HB-B71 6-0

**2007**
5. apríl **KÍ-VB/Sumba 5-0**
7. oktober **EB/Streym.-VB/S. 6-1**
21. oktober **GÍ-Skála 5-0**

**2006**
13. apríl **Skála-VB/Sumba 5-0**
7. mai **NSÍ-ÍF 6-1**
21. mai **VB/S.-EB/Streym. 0-5**
2. juni **B36-HB 6-0**
5. juni **VB/Sumba-KÍ 1-7**
3. juli **EB/Streymur-B68 8-2**
17. september **B68-VB/. 6-1**

**2005**
11. mai **HB-ÍF 6-0**
22. mai **KÍ-TB 6-1**
10. juli **HB-ÍF 9-0**
7. august **EB/Streym.-VB/S. 6-1**

# Svimjing um Nólsoyarfjørð 14. august

Stuðulsnevndin fyri svimjihyli í Nólsoy.

Svimjingin um Nólsoyarfjørð hevur vanliga verið fyriskipað á ovastevnu, t.v.s. annað vikuskiftið eftir ólavsøku. Soleiðis verður eisini í ár.

Hetta hevur verið at lisið á www.triathlon.fo.

Kappingin er fyri motiónistsvimjarar, kappsvimjarar og svimjiáhugaðum annars.

Hetta er 13 árið á rað at skipa verður fyri stuðulssvimjing til Nólsoyar, til frama fyri svimjihyl í Nólsoy, og verður í ár aftur kryddrað við at svomnir verður tveir teinar.

Vanliga teinin, har byrjað verður niðanfyri hjá radioamatørunum við Strond. Teinurin er 4000 metrar til Nólsoyar bygd.

Hin teinurin er 1000 metrar, og byrjað verður frá báti, ið liggur úti fyri bygdini.

Fyri at fáa alt at ganga so trygt og gott sum gjørligt, møtast øll hjá Radioamatørunum við Strond ein tíma áðrenn svimjingin byrjar.

Har verður kunnað um tiltakið og aðrar fráboðanir annars givnar.

Klokkan 9.00 leypa tey, ið svimja 4000 m, á bláman yviri við Strond við Stóradam, niðanfyri hjá Radioamatørunum.

Tey, ið svimja 1000, fara samstundis í bátarnar og sigla til startmálið 1000m úr Nólsoyar bygd, har tey byrja svimjingina uml. kl 10.00.

Málið hjá báðum bólkum er Ærisportrið á keiini í Nolsoy. Um svimjari kemur á land aðrastaðni, má hann renna seinasta teinin.

At ansa eftir eru samarittar við á ferðini um fjørðin, og nólsoyingar taka ímóti og hjálpa svimjarunum, tá komið er upp á land.

